90 SEKUND

# HANUS JOENSEN, SKÚLASTJÓRI

LAGT TIL RÆTTIS: Rigmor Dam



MYND: JENS KRISTIAN VANG

**FAKTA HANUS JOENSEN**

**Navn:** Hanus Joensen
**Aldur:** 59 ár
**Heimstaður:** Tórshavn
**Yrki:** Skúlastjóri
**Familja:** Giftur við Brynhild Mohr Joensen, og børnini eru Anna Mohr Holm, Heini Hanusarson og Tummas Pauli Hanusarson.

# Skúlastjórin, sum elskar sitrónfromasju

**Hvat er tað fyrsta tú minnist?**
Eg minnist millum annað, tá fyrsta elperan tendraði á Kjalnesi í 1953.

## Hvat minnist tú best frá skúlatíðini?
At vit roknaðu fer- og rúmrøtur við hond í barna-skúlanum í Kollafirði hjá Djurholmi.

**Hvussu ert tú sum bilførari?**
Eg eri ein góður bilførari, sum stundum hevur skund.

**Hvat ger teg bangnan?**
Lívshóttandi støður.

**Hvussu nógv tjenar tú um mánaðin?**
Umleið 40.000 krónur.

**Hvør er tín yndisdessert?**
Har eru fleiri. Men sitrónfromasja er serliga góð.

**Hvar/nær hevði tú viljað verið ein fluga á vegginum?**
Nei, eg havi onki ynski tann vegin.

**Fortel um tín fyrsta muss:**
Hann fekk eg frá mammu míni 9. juli 1950.

**Hvat sigur tú, tá næmingar verða sendir inn til stjóran?**
Eg sigi teimum orsøkina til prátið og lurti væl eftir teirra frágreiðingum. Orðaskifti og avtali við teir um veruleikakent mennandi framhald í skúlagongdini.

**Hvat er flóvisligt?**
At verða mintur á tað sjálvsagda.

**Hava tú og frúan felagsøkonomi?**
Ja.

**Hvør jólakaramella er best?**
Tær í blákollutu bjálvingini.

## Hvørjum hevur tú ein veikleika fyri?
Góðum mati og strongdum støðum.

## Hvat ert tú glaðast fyri, við tíni egnu útsjónd?
Nøgdur við heildarstøðuna.

**Hvør núlivandi føroyingur er ordiliga kulur?**
Kulur - so meinar tú ung fólk, giti eg. Kundi nevnt fleiri av okkara næmingum, men taki kortini tveir burturúr fyri serliga djúphugsið, dúgligt og miðvíst arbeiði: Helgi Ziska, altjóða meistari í talvi, og Mattias Kapnas, klaversnillingur, sum báðir tóku víðkað fólkaskúlaprógv í Kommunuskúlanum í 2007.